**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Svimjisamband Føroya bjóðar hervið til

# Aldursbólkameistarastevnu 2020



**Dagfesting**: 30. mai - 1. juni 2020

**Svimjihøll**: Svimjihøllin í Gundadali
6 x 25m innandura svimjihylur

**Adressa**: Gundadalur 4, FO-100 Tórshavn
www.svimjihollin.fo

**Luttakarar**: Øll sum hoyra til bólk 3 og 4 hjá SSF, yngri kunnu luttaka í bólki 3
Sí Reglugerð um bólkabýti og Reglugerð fyri Meistarastevnur

**Innboðin feløg**: FLOT, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag,
Reysti, Suðuroyar Svimjifelag, Ægir

**í samstarvi við**

HS · ATLANTIC AIRWAYS

## Stevnupartar

1. partur: Leygardag 30. mai frá kl 10:30 - Beinleiðis finalur - Bólkur 3

2. partur: Sunnudag 30. mai frá kl 10:30 - Beinleiðis finalur - Bólkur 4

Upphiting byrjar 2 tímar áðrenn hvønn stevnupart

## Tekniskir fundir

Tekniskur fundur fyri dómarar er í svimjihøllini 1 tíma áðrenn hvønn stevnupart

Tekniskur fundur fyri venjarar er í svimjihøllini 1½ tíma áðrenn fyrsta stevnupart

## Kappingarskrá

Kappingarraðfylgjan er sum hon plagar, tó uttan liðsvimjingar og 800 frí, umframt at bólkarnir hvør sær avgreiða alt sítt uppá éin dag, uttan døgverðasteðg men við regluligum pausum.

| ~~**Dagur 1**~~ | ~~**Dagur 2**~~ | ~~**Dagur 3**~~ |
|---|---|---|
| 1. 200 frí gentur | 15. 50 bringa gentur | 27. 50 frí gentur |
| 2. 200 frí dreingir | 16. 50 bringa dreingir | 28. 50 frí dreingir |
| 3. 100 bringa gentur | 17. 100 frí gentur | 29. 200 rygg gentur |
| 4. 100 bringa dreingir | 18. 100 frí dreingir | 30. 200 rygg dreingir |
| 5. 100 rygg gentur | 19. 100 firvald gentur | 31. 200 bringa gentur |
| 6. 100 rygg dreingir | 20. 100 firvald dreingir | 32. 200 bringa dreingir |
| 7. 50 firvald gentur | 21. 400 blandað gentur | 33. 100 blandað gentur |
| 8. 50 firvald dreingir | 22. 400 blandað dreingir | 34. 100 blandað dreingir |
| 9. 200 blandað gentur | 23. 50 rygg gentur | 35. 400 frí gentur |
| 10. 200 blandað dreingir | 24. 50 rygg dreingir | 36. 400 frí dreingir |
| ~~11. 800 frí gentur*~~ | ~~25. 4x100 frí gentur~~ | 37. 200 firvald gentur |
| ~~12. 800 frí dreingir*~~ | ~~26. 4x100 frí dreingir~~ | 38. 200 firvald dreingir |
| ~~13. 4x50 frí gentur~~ | | ~~39. 4x50 blandað gentur~~ |
| ~~14. 4x50 frí dreingir~~ | | ~~40. 4x50 blandað dreingir~~ |

~~*Einans bólkur 4~~

Á 400 teinunum verður luttøkan avmarkað til 1 riðil fyri hvønn aldursbólk.

Hvør einstakur svimjari má í mesta lagi melda seg til 8 kappingar.

## Aldursbólkar

- Bólkur 3: Gentur føddar í 2009 ella seinni, Dreingir føddir í 2008 ella seinni
- Bólkur 4: Gentur føddar í 2007 ella 2008, Dreingir føddir í 2006 ella 2007

Bólkarnir kunnu verða savnaðir í sama riðli. Úrslit og heiðursmerki verða bólkabýtt

## Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr 25 fyri hvønn start hjá einstaklingi ~~og kr 100 fyri hvønn start hjá liðsvimjing~~. Svimjifeløgini gera sjálvi upp luttøkugjøldini fyri sínar svimjarar ~~og liðsvimjingar~~, og flyta samlaðu upphæddina til Svimjisamband Føroya á konto 6460 - 151.845.5 í BankNordik.

## Tilmeldingar

Tilmeldingarfíla í Grodan-sniði er send við hesi innbjóðing til øll feløg. Tilmeldingar skulu sendast í Grodan-sniði til ssf@ssf.fo í seinasta lagi leygardag 23. mai 2020, við bankakvittan fyri luttøkugjald. Ov seinar tilmeldingar verða ikki góðtiknar, og eiheldur tilmeldingar uttan gjald.

Allir viðkomandi svimjarar skulu undanfráboðast her ella til ssf@ssf.fo í seinasta lagi 8. mai 2020.

## Tilmeldingartíðir

Tilmeldingar skulu vera við tíðum svomnar í hesum kappingarárinum, tvs. síðani 1. september 2019. Um svimjarin ikki hevur nakra tíð, so kann meldast til við ongari tilmeldingartíð.

## Frámeldingar

Avmeldingar uttan læknaváttan útloysa bót á kr 200.
Væntandi uppmøting til start útloysir bót á kr 500.

## Dómarar og hjálparfólk

SSF skaffar dómarar og hjálparfólk til hesa stevnu

## Stjórn á stevnuni

Kappingarleiðari er Ólavur Hansen.
Yvirdómari er Dann Hjelm og startari Eyðun Húsgarð.
Møguligar klagur skulu stílast til svimjinevnd SSF, við gjaldi á kr 700.

## Corona-tilmæli

SSF ger í samráð við corona-ráðgevingina og onnur eitt corona-tilmæli at yvirhalda ísv. hesa stevnu. Hetta tilmæli verður sent feløgunum í seinasta lagi hin 15. mai 2020.

Almennu tilmælini verða sjálvsagt eisini vird, sum lýst á www.corona.fo

## Beinleiðis úrslit

Øll úrslit frá ABMS 2020 verða at síggja beinleiðis á www.livetiming.se

## Samband

Spurningar og viðmerkingar kunnu stílast til ssf@ssf.fo

ATLANTIC AIRWAYS